# Gleð teg til hetta í komandi OYGGJA-BLAÐI

Mikudagin kemur Sosialurin út við einum serstakum blaði um Sundalagsstevnuna í Hvalvík.

– Eg ynski at liva av tónleiki





– Einki er sum á Langasandi



– Vit skulu ikki vera aftast

– Børnini læra meg føroyskt





Heðin riggar bátin til summarið

# Standa á berum um kjøtstuldrarnar

**STULDUR** Kriminalpolitiið hevur enn onga hóming av, hvør kann hava stolið tey tjúgu tjógvini og annað í Vágum seinastu tíðina

Randi Jacobsen



*Eitt tjógv er nógv vert, og taðå kann hugsast at stolnu tjógvini eru ætlað at selja fyri at fáa pening til rúsevni*

Tað gongur illa hjá kriminalpolitiinum at loysa gátuna um teir mongu stuldrarnar, sum hava verið í Vágum seinastu mánaðirnar.

Í seinastu viku helt politiið seg hava eina slóð at elta, men tað vísti seg, at vegurin var blindur.

– Tað ganga túsund søgur, og vit hava roynt og kannað alt, men einki hevur givið nakað, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá politinum.

Innbrot hava verið handlar og á virkjum, men tað mest óhugnaliga er, at tjóvarnir hava verið í hjøllum og í frystiboksum heima hjá fólki og stolið kjøt. Summir av hesum stuldrunum eru framdir á alljósum degi.

Nógvar rannsóknir eru gjørdar, og húsarannsóknir somuleiðis. Húsarannsóknirnar eru gjørdar við vælvild frá fólki, tí heimild er ikki til at gera húsarannsókn, uttan so at onkur í húsinum er skuldsettur.

## Nógv kjøt

Tað snýr seg um samanlagt 20 tjógv, sum eru stolin, og kriminalpolitiið hevur heitt á fólk, sum fáa boðið kjøt til keyps, um at siga frá. Politiið hevur eisini kannað lýsingar við kjøti til sølu, men tað hevur alt verið loyvligt.

Av tí at nøgdin av stolnum kjøti err so stór, útilokar Bergleif Brimvík ikki, at tjóvarnir hava stolið fyri at fáa pening at keypa rúsevni fyri.

Kriminalpolitiið heitir á fólk, sum hava sæð ella frætt okkurt, ið kann setast í samband við teir mongu stuldrarnar, um at siga frá. Tað ber til at fáa frá og vera ónevnd.

# Víkingur gevur Rás2 einarætt

Víkingur heldur fast um, at felagið hevur rættindi til sínar egnar heimadystur og hevur givið Rás2 einarætta at útvarpa frá hálvfinaluni millum Víking og ÍF týskvøldið

Tróndur Arge

Hóast bæði Ítróttasambandið, Fótbóltssambandið og Kringvarpið hava gjørt vart við, at tey hava eina avtalu um, at Kringvarpið kann útvarpa frá fótbóltsdystum í Føroyum, heldur Víkingur, at felagið sjálvt ræður fyri, hvør útvarpar frá heimadystum hjá teimum.

– Vit halda okkum eiga rættindini til okkara heimadystir, og til nakað annað er skjalprógvað, halda vit okkum til tað, sigur Páll Gregersen, formaður í Víkingi.

– Føroyskur fótbóltur hevur brúk fyri Rás2, tí rásin dugir væl at gera dystir spennandi bæði áðrenn, meðan og eftir, og tað hevur fótbólturin brúk fyri, sigur Páll Gregersen.

Víkingur heldur tí fast við, at Rás2 hevur fingið einkarætt at senda frá seinnu hálvfinaluni í steypakappingini millum Víking og ÍF týskvøldið.

Rás2 hevur sagt, at rásin vil bert útvarpa, um Kringvarpið ikki eisini útvarpar frá dystinum.

– Eg fegnist um, at Víkingur hevur givið Rás2 rættindini til hendan dystin, og vit ætla at gera okkara besta fyri at geva okkara lurtarum eitt gott og spennandi fótbóltsupplivilsi týskvøldið, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

Rás2 sendir úr Gøtu beint eftir tíðindini týsdagin klokkan 17.00.



# Morgun-ballini eru long

**ÓFRIÐUR** Sonevndu afturlatnu ballini á vertshúsum í Havn hava við sær, at ung fólk ganga og vála í býnum langt út á fyrrapartin sunnudag. Og fleiri fáa bót fyri brot a politiviðtøkurnar

Randi Jacobsen

Klokkan sjey sunnumorgunin kókaði býurin framvegis við ungfólki, og hetta vóru fólk, sum høvdu verið í tiltiknu morgunballunum á vertshúsunum í býnum.

Summi av hesum fólkum vóru í øðrviti, og onnur ill í sær.

Tríggjar ferðir valdi politiið at skriva upp brot á politiviðtøkurnar.

Í samband við, at ein ungur maður var heldur harðligur, fór politiið at tosa við henda mannin, sum rópti ókvæmisorð eftir politinum. So legði ein annar ungur maður uppií, vildi ikki akta og fara og tók í armin á einum politisti. Politisturin valdi tá at brúka piparsprey móti manninum, sum varð tikin við á politistøðina at skola sær eyguni.

Vertshúsini hava loyvi at hava hesi morgunballini, men treytirnar eru ymiskar fyri tey ymisku vertshúsini. Summi hava 24 tímarfreist, onnur 48 tímar at boða frá, at tey fara at hava afturlati morgunball. Summi skulu frammanundan upplýsa nøvnini á luttakarunum. Hesum sleppa onnur undan. Halda tey reglurnar, fær politiið einki gjørt.

Politiið dámar einki skipanina við morgunballunum, tí tey hava við sær, at ung fólk ganga og mala og tvætla í býnum til langt ut á fyrrapartin sunnudag.